

Hans Christen Rønnevik, leitileiðari hjá Lundin.

# Gandakallurin sum hevur nøs fyri olju

**Jógvan Hugo Gardar**

20.12.2014 - 18:27

Oljan.fo

Farnu árini er olja og gass funnin á fleiri stórum leitiøkjum í norskum sjógvi. Millum hesi eru Johan Sverdrup, Snorre, Alta, Alvheim, Volund, Gohta.

Tann sum hevur havt ein avgerandi leiklut í kanningararbeiðnum og leitingini er Hans Christen Rønnevik. Hann er leiðari fyri leititoyminum hjá svenska oljufelagnum Lundin. Rønnevik, ið hevur arbeitt í oljuvinnuni í nógv harrans ár, og hjá fleiri oljufeløgum hevur ein sjáldsama langan lista yvir væleydnaðar leitiætlanir á norska landgrunninum.

Í oljuvinnuni er hann kendur fyri at tevja olja langan veg. Nú fær hann eina amerikanska heiðursløn fyri sítt arbeiði:*The Norman H. Foster Outstanding Explorer Award*.

Hetta er ein heiðursløn sum hevur stóran týdning innan oljuídnaðin, serliga í USA. Tað sermerkta við heðursløníni til Rønnevik, er at hann er tann fyrsti uttanfyri Norður-Amerika sum fær heiðurin.

Tað erThe American Association of Petroleum Geologists (AAPG) sum letur heiðursløníina. AAPG er heimsins største felag fyri jarðfrøðingar, við meir enn 30.000 limum.

Sjálvur sigur Rønnevik, sambært Teknisk Ukeblad, at tað er gott at ein í USA eisini sær hvat sum verður gjørt aðrastaðni í heiminum innan oljuleiting.

Rønnevik hevur fingið fleiri heiðurslønir fyri sítt drúgva arbeiði í olju- og gassvinnuni. Millum annað hevur hann foingið Oilman of the Year frá Society of Petroleum Engineers, umframt at hann á heimavølli, í Noregi, hevur fingið NPF-heiðursløníina hjá Norsk Petroleumsforening.